

# RÆÐS Í MALMØ

Í **YVIR** EITT **ÁR** ER EIN EINSAMALLUR **MAÐUR** SLOPPIN AT **RÆÐA** EIN HEILAN **BÝ**. HANN ER **LJÓSHÆRDUR**, UMLEIÐ **30 ÁR**, OG ENN GONGUR HANN **LEYSUR** HÓAST AT **HUNDRATALS** POLITISTAR **LEITA** EFTIR HONUM. FØROYSKA **ELSA BECH** ER EIN AV NÓGVUM **FØROYINGUM**, IÐ BÝR Í **MALMØ**, OG HON **TORIR** IKKI AT **BÍÐA** EFTIR BUSSINUM Í **MYRKRI** LONGUR



MALMØ
**Inna Törnroos**
inna@sosialurin.fo

Fyrstu skotini vóru latin av 20 oktober í fjør, tá ein ung genta varð myrd. Sjeikurin hjá henni var nýligani leyslatin úr fongsli, og tí helt politiið, at talan var um eina hevndaratsókn ímóti honum. Men skotini hildu á fram, og tilsamans hevur sami maður skotið eftir fólki heilar 15 ferðir seinasta árið.

Fleiri fólk hava fingið lívshættisligar skaðar, men unga gentan er einasta deyðsoffrið higartil.

Elsa Bech hevur búð í Malmø í fýra ár. Hon býr í friðarliga býarpartinum Oxie, 10 minuttir uttanfyri sentrum.

– Vit hava ikki haft nakra slíka hending her nærhendis hjá okkum, men hetta ávirkar meg og ger, at eg eri meira varin nú, enn eg havi verið, sigur Elsa.

Ein persónur varð skotin, meðan hann stóð og bíðaði eftir bussinum. Elsa hevur bil, og tað er hon glað fyri, tí hon nokk ikki hevði torað at staðið í einum bussskýli, nú hesin maðurin ger um seg.

## Útlendingar

Øll tey, ið skotið er eftir, eru av útlendskum uppruna. Tað hevur gjørt, at nógv tosa um, at maðurin er rasistur og er eftir útlendingunum í Malmø. Umleið 30.000 innflytarar búgva í Malmø og Rosengård økinum, ein tann kendasti úr hesu møki er fótbóltspælarin Zlatan Ibrahimovich.

Nógv minnast aftur á sokallaða »Lasermannin« John Ausonius, ið skeyt innflytarar í svenska høvuðsstaðnum, Stockholm, í 1990-unum. Hann nýtti eina byrsu við lasara, og beint áðrenn hann loysti av, var ein reyður prikkur at síggja á teimum, hann skeyt eftir. John Ausonius varð fangaður og situr enn fongslaður. Hann drap eitt fólk, og tíggju vóru sær ta ferðina.

Tí kalla nógv mannin í Malmø fyri »nýggja lasermannin«. Hann hevur ongan lasara, men hann skýtur innflytarar og bara tey.

– Av tí at flestu hendingarnir eru, tá tað er myrkt, royni eg ikki at fara út tá, sigur Elsa. Hon vil heldur ikki, at dótturin skal verða einsamøll úti.



MYND: JENS KRISTIAN VANG

*Elsa Bech býr í Malmö og skotini ávirka hana í hennara gerandisdagi*

## Rasistiskt land

Eftir valið í september, tá ein rasistiskur flokkur, Svøríkis Demokratarnir, kom í Ríkisdagin,